# Ein dýr og vøkur brúgv skal gerast um Sandá



Uppskot um, hvussu brúgvin um Sandá kann síggja út



**Tórshavnar Býráð hevur nú sett skjøtil á arbeiðið at gera eina brúgv um Sandá, sum skal binda saman ringvegin um Havnina og Glyvursvegin út á Argir**

FERÐSLA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tórshavnar Býráð boðar frá, at nú Glyvursvegur er um at verða liðugur, er næsta stigið at gera brúnna um Sandá, so nýggja farleiðin út á Argir frá ringvegnum uttan fyri kirkjugarðin við Velbastaðvegin út í Glyvursvegin, kann takast í nýtslu.

Bygginevndin fyri brúnna um Sandá er nú mannað, og í nevndini eru sjey limir, fýra limir eru úr kommunalu umsitingini, teir eru Boði Haraldsson, býarverkfrøðingur, Mikael Viderø, býararkitektur, Heri Olsen, roknskaparleiðari, Michael Jacobæus, landskapsarkitektur.

Tey trý politisku umboðini í bygginevndini eru, Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd, Sjúrður Olsen, nevndarlimur í teknisku nevnd og Bogi Andreasen, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini, sum øll síggjast á myndini.

Ymsar brúgvaloysnir hava verið umrøddar, tó eru politisku umboðini samd um, at brúgvin skal verða snøgg, einkul og skal vera eitt prýði fyri økið. Brúgvin skal ikki fylla óneyðuga nógv í landslagnum, tí landslagið og áin eru vøkur frá náttúrunar hond, og tí skal ikki stjalast nakað frá henni við eini yvirdimensionerari brúgvaloysn.

Eisini eru politisku umboðini samd um, at áin ikki skal rørast og at tað skal vera møguleiki at ganga fram við áarbakkanum. Ein slík brúgv er rættiliga dýr at byggja, og enn er peningur ikki settur av til verkætlanina, men meiningin er at fáa hana inn í langtíðar íløguætlanina hjá kommununi.



*Politisku umboðini í bygginevndini fyri brúnna um Sandá, eru Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen*

Nevndin fer nú at arbeiða við fyrireikingini av at gera brúnna, tá ið tað er langt ímillum at brýr av slíkari støðd verða bygdar í Føroyum er fyrireikingararbeiðið drúgt og neyðugt er at søkja sær servitan. Eisini skulu friðingarmyndugleikarnir góðtaka brúgvaloysnina.

# Lars Norén í Norðurlandahúsinum



**Dokumentarfilmur og fyrilestur um svenska dramatikaran Lars Norén**

MENTAN

*Tíðindaskriv*

Hóskvøldið verður sera áhugaverd filmssýning við fyrilestri og orðaskifti í Norðurlandahúsinum. Tað er Per Zetterfalk úr Svøríki, ið fer at sýna sín dokumentarfilm KALL um Lars Norén, ið verður roknaður fyri at vera ein hin fremsti svenski dramatikarin síðan Strindberg.

Leikirnir hjá Lars Norén eru nógv leiktir runt um í heiminum, og hann er ein á allan hátt ein sera kreativur persónur. Í tvey ár fekk Per Zetterfalk loyvi at sleppa handan leiktjøldini og fylgja við tí annars so fjølmiðlasmæðna Lars Norén og fáa eitt innlit í norensku skapanartilgongdirnar, sum eingin undan honum hevur megnað.

Um dokumentarfilmin KALL hevur kendi danski dokumentarframleiðarin Jørgen Leth sagt: »Ein týdningarmikil filmur. Norén er ein risi, og Zetterfalk letur hansara heilt serstøku arbeiðistilgongdir upp fyri okkum«.

Hóskvøldið verður høvi at síggja dokumentarfilmin og hoyra Per Zetterfalk greiða nærri frá um Lars Norén og filmsframleiðsluna annars. Eisini verður høvi at skifta orð við Per og seta honum spurningar. Tiltakið er alment og ókeypis og byrjar kl. 19.30.